# SKIPAFLOTIN H

**ÓSEMJA** Alt bendir á, at føroyski fiskiskipaflotin verður lagdur um eina viku ella so. Einki er, sum bendir á, at stríðandi partarnir, sum eru Reiðarafelagið øðrumegin og manningarfeløgini hinumegin, fara at semjast um nýggjan sáttmála, nú oljan er vorðin ein so avgerandi og prinsipiellur spurningur í samráðingunum um nýggjan sáttmála



Vilmund Jacobsen

Eftir at manningarfeløgini, Føroya Fiskimannafelag, Føroya Skipara-og Navigatørfelag og Maskinmeistarafelagið øðrumegin og Føroya Reiðarafelag hinumegin, hava roynt at funnið semju um nýggjan sáttmála heilt síðan í desember, hevur hetta kortini ikki eydnast.

Tíðliga í hesi vikuni vórðu boð send eftir semingsfólki, og nú eru tað semingsmenninir, sum koma at gera av, hvussu teir skipa sínar semingsroyndir millum partarnar.

Ætlandi byrja veruligu semingsroyndirnar nú fríggjadagin og soleiðis, sum fráboðað hevur verið, er týsdagurin í næstu viku dagurin, tá tað antin má bera ella bresta millum partarnar.

Manningarfeløgini og reiðarafelagið eru vorðin samd um onkrar smærri broytingar í gamla sáttmálanum, men semja er als ikki um tað stóra stríðsmálið í øllum samráðingunum, sum hevur verið oljan.

Reiðarafelagið hevur í samráðingunum lagt upp til, at manningarnar luttaka í øktu oljuútreiðslunum, nú bunkringin er vorðin so nógv dýrari, men hetta hava manningarfeløgini ikki viljað hoyrt talan um. Manningarfeløgini meta ikki, at teirra limir í enn størri mun hava ráð til at hjálpa reiðarunum við at gjalda olju.

Í tveimum sáttmálum av tilsamans átta fer oljan av óbýttum, men reiðarafelagið hevur sett sum krav fyri nýggjum sáttmála, at soleiðis skal verða í øllum sáttmálum.

**» ... umframt skipini, sum fiska undir Føroyum, eru nøkur fá skip á fjarleiðum í løtuni, og tey fáa eftir øllum at døma ikki boð um at koma til lands, fyrr enn tíðin er komin, at tey aftur koma í føroyska havn...**

Reiðarafelagið hevur í samráðingunum víst til eitt nøkur ára gamalt sonevnt protokollát sum sigur, at vendast skal aftur til møguliga luttøku í oljuútreiðslunum, um oljan fer upp um 2,90 fyri liturin.

Felagið hevur samstundis víst á, at nú bunkringarprísurin nærkast 4 krónum fyri liturin, er skiparaksturin vorðin so tungur, at nærmast ógjørligt er at reka skipini.

Sum eina møguliga gongda leið, nú samráðingar hava verið millum partarnar í vikur, hevur felagið skarvað burtur av sínum kravi og hevur skotið upp, at manningin luttekur í oljuútreiðslunum í tann mun, oljan fer upp um 2,90 krónur fyri liturin.

Men heldur ikki hetta hevur ført til, at partarnir kundu semjast.

Manningarfeløgini hava víst á, at tey í nevnda protokolláti ikki hava bundið seg til luttøku, men bara hava givið sína undirskrift upp á, at spurningurin um oljuna kann takast uppaftur. Hetta merkir tó ikki neyðturviliga, at tey vilja luttaka.

Undir samráðingunum, sum hava verið hesar seinastu vikurnar, hava feløgini tvíhildið um, at manningarnar ikki í størri mun enn higartil skulu luttaka í oljuútreiðslunum.

Reiðarafelagið hevur hinvegin hildið upp á, at tað í prinsippinum ikki kann vera rætt, at skipini í flestu sáttmálum skulu bera allan kostnaðin av øktu oljuútreiðslunum.

Felagið hevur eisini víst á, at um oljuútreiðslurnar minka aftur, soleiðis at bunkringarprísurin kemur niður aftur á 2,90 krónur fyri liturin, er eingin broyting í hesum viðurskiftum hjá manningunum.

Í øðrum lagi heldur Reiðarafelagið eisini, at ein endalig loysn á spurninginum um oljuna hevði borgað fyri einum tryggari sáttmála fyri báðar partar – ikki minst, nú seinnu árini hava víst, at oljuprísirnir kunnu órógva raksturin og soleiðis skapa afturvendandi órógv í viðurskiftunum millum reiðarí og manningar.

### Døpur útlit

Undir hesum samráðingunum hevur Reiðarafelagið hildið rættiliga fast um, at manningarnar skulu luttaka í oljuútreiðslunum, og einki bendir á, at nýggjur sáttmáli verður undirskrivaður, um hetta ikki verður ein partur av eini semju.

Útlitini til, at fiskiskipaflotin kemur at liggja, um semingsstovnurin ikki megnar at mýkja partarnar munandi, eru rættiliga stór og í samrøðum við stríðandi partarnar, nú samráðingarnar slitnaðu, bendir einki á, at nøkur løtt loysn liggur fyri framman.

Føroyska samfelagið kann tí brynja seg til, at fiskiskipaflotin møguliga verður lagdur einaferð miðskeiðis í komandi viku – ella so hvørt, sum skipini, ið eru til fiskiskap, koma inn at landa.

Reiðarafelagið hevur havt fund um, hvussu felagið skal






*Hóast samráðingarnar millum reiðarar og manningarfeløg hava vart í vikur, er ikki eydnast pørtunum at finna semju. Viberg Sørensen, formaður í Føroya Reiðarafelag, Jan Højgaard, formaður í Føroya Fiskimannafelag, Eyðstein Djurhuus, formaður í Føroya Skipara-og Navigatørfelag og Páll Hansen, formaður í Maskinmeistarafelagnum*